# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um okkara kæru vinkonu og floksfelaga úr Kommunuskúlanum, Ingu Arge

**f. 23. desember 1965 – d. 29. juli 2007**

Sunnudagin hin 29. juli 2007 andaðist okkara kæra vinkona, Inga Arge, brádliga, bert 41 ára gomul. Tað kennist so óveruligt so brádliga at missa ein javnaldra í bestu árum.

Vit gingu allar í flokki saman í Kommunuskúlanum í Havn og spældu sum børn flest. Hava fylgst nógv og hitst javnan - eisini í vaksna lívinum. Tá vit minnast aftur á allar tær góðu løturnar, ið vit hava havt saman, er tað so tungt at hugsa, at veruleikin er, at vit ikki aftur skulu hava slíkar løtur, hvar eisini tú, Inga, er partur av hesum.

Nógv er hent í tínum stutta lívi. Eftir skúlan arbeiddi og ferðaðist tú. Tú vart í London, Fjareystri, USA, Ísrael og Norra. Tá ið tú vendi aftur úr útheiminum, fór tú aftur á skúlabonk og tók eina HF eksamiu. Tín stóri áhugi var blómur og trø, og



gjørdist tú eisini gartnari. Afturat hesum fekst tú tvey deilig børn. Okkara tankar leita til teirra og familju tína.

Altíð vart tú so glað og hevði mót upp á lívið. Hetta vísti tú eisini, tá tú fyri einum ári síðani byrjaði at lesa sjúkrarøktarfrøði í Aalborg. Tú komst heim í summarferiu aftan á at hava staðið allar royndirnar. Lívsmótið og stoltleikin lýstu av tær. Vit vóru allar so glaðar, tína vegna. Tú gjørdi húsini og havan í stand – ja ikki var nakar, ið kundi vita, at hetta bleiv seinasta avrik títt.

Inga, vit sakna teg ómetaliga nógv og vilja við hesum orðum lýsa frið yvir minnið um okkara kæru vinkonu, Ingu Arge.

**Heilsan vinkonurnar**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Margretha Hammer**, vanliga nevnd Gretha, búsitandi í Ljósá, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mánadagin, 6. august, 71 ára gomul. Jarðarferðin verður úr røktarheiminum hósdagin klokkan 14.

**Anna Hansen, Vestmanna**, andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 5. august, 71 ára gomul. Kistan kemur í Saron í Vestmanna í kvøld klokkan 19. Jarðarferðin verður mikudagin, 8. august klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Annu, kunnu lata Saron eina gávu, konta í Eik banka.

Kistan við **Heina S. Glerfoss, Mikladalur**, fer av Landssjúkrahúsinum týsdagin klokkan 13.30. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni mikudagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

*(Kelda: uf.fo)*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vístu samkenslu, tá ið kæri mammubeiggi, pápabeiggi, ommubeiggi, abbabeiggi og svágur

**Hákun S. Djurhuus**
Porkeri

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk fyri troystarík orð í kapellinum, í Betania, í kirkjugarðinum og til tykkum, ið hjálptu til við ervinum. Tøkk til Suðuroyar Sjúkrahús fyri góða umsorgan og røkt tíðina hann var har.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir, uppringingar og peningagávu til Zarepta.
Tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Charlotta Djurhuus**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið vístu samkenslu, tá kæra mamma, vermamma og omma okkara

**Lena Niclasen**
Vágur

doyði og varð jarðað.
Takk til tykkum á Suðuroyar Sjúkrahúsi.
Takk øll, ið hjálptu til við jarðarferðina og takk til prest fyri troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Eldrasambýlið og takk øll tit, ið fylgdu henni til hennara síðsta hvíldarstað.
Somuleiðis takka vit hjartarliga øllum á Eldrasambýlinum, ið vóru um hana tey síðstu árini.
Takk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Niclas, Eyðbjørg og Fríðbjørg**

# Vilhelm Johannesen 65 ár



Seinasta leygardag fylti Vilhelm Johannesen, tingmaður 65 ár. Vilhelm Johannesen varð føddur 4. august 1942 í Klaksvík og er sonur Estrid og Bethuel Johannesen. Politiska yrkisleiðin hjá Vilhelmi byrjaði, tá hann sum 37 ára gamal í 1979 gjørdist landsstýrismaður. Hetta komst av, at Jacob Lindenskov, sum tá var landsstýrismaður, við 1255 atkvøðum varð valdur á Fólkating, eftir at Johan Nielsen gjørdi av ikki at stilla upp aftur. Vilhelm var næstvaldur á listanum við 867 atkvøðum, og tað fall honum í lut at taka við landsstýrissessinum eftir Jacob Lindenskov.

Við løgtingsvalið í november 1980 varð Vilhelm fyrstu ferð valdur, og hevur sitið á tingi síðani burtursæð frá tíðarskeiðnum 1985 – 1989, tá hann var landsstýrismaður. Nú Vilhelm fyllir 65, hevur hann sostatt sitið 27 ár á tingi.

Vilhelm hevur verið landsstýrismaður í tveimum umførum. Fyrstu ferð frá 1979 – 1981 sum landsstýrismaður við almanna- og heilsumálum, arbeiðsmarknaðarmálum og ídnaðarmálum. Seinna skeiðið var fra 1985 – 1989 við málsøkjunum aling og ídnaður, ferðavinna, onnur sjóvinna, arbeiðsmarknaðarmál og lógarmál. Vilhelm gjørdist sostatt fyrsti landsstýrismaður í alimálum.

Á tingsins røðarapalli er Vilhelm sum tikin úr leikum, og minnið hevur hann sum fáur. Væl er hann skorðin fyri tungubandi, og pennurin góður.

Sum blaðstjóri á Sosialinum frá 1972 – 1979 vísti hann síni kynstur sum debatørur. Tá tað kom fyri, at fax´ið ikki riggaði, og ein oddagrein var strandað í Klaksvík tók hann hornið, og las hana upp yvir telefonina. Og skuldi ein grein fáast til vega í skundi, ja so var telefonin brúkt, og Vilhelm dikteraði "...og hvat gjørdi Pauli Ellefsen? Hann stakk halan millum beinini og rýmdi!". Uttan pappír og blýant risti hann burturúr ermuni uttan stórvegis hóvasták.

Tíðarskeiðið 1973 – 1975 var Vilhelm blaðstjóri burturav. Hetta var eisini um tað mundið Sosialurin setti tey fyrstu blaðfólkini Jákup N. Nielsen og John Sigurd Johannesen.

Fleiri føroyingar vóru tá niðri og lósu til journalist. Útbúgvingin var skipað, sum nú, við skúlatíð og praktikktíð. Tey, sum ynsktu í prakktikk hjá bløðunum í Føroyum høvdu tó ikki møguleika, tí einki blað var góðkent praktikkpláss.

Vilhelm fekk tó Sosialin góðkendan sum prakktikkpláss, tá hann sendi rektaranum á journalistskúlanum bræv saman við einari frágreiðing um Sosialin og nøkrum útgávum. Teir fyrstu praktikantarnir vóru Johan Mortensen, Jan Müller og Jógvan Jespersen, sum allir eru rættiliga kendir innan fjølmiðlaheimin í dag.

Av politiskum álitisstørvum kann nevnast, at Vilhelm hevur verið limur í starvsnevnd Javnaðarfloksins frá 1972 til 2003, figgjarnevndarlimur 1989 – 1996 og aftur frá 2004 til í dag. Vilhelm var formaður í Føroya kommunufelag 1979 – 1981, tá IRF varð sett á stovn.